# Nú er bara Pál eftir

NJM var seinasta kappingin hjá føroysku juniorsvimjarunum hesa vetrarhálvuna, undantikið jólakappingina, sum verður í Havn næsta vikuskifti.

Mikudagin byrjar heimsmeistarastevnan á stuttgeil í Dubai. Pál Joensen skal taka lut í 400 og 1500 metra frísvimjing. Tað verður fríggjadagin 17. desember og 19. desember.

# Birita Debes vann einasta gullið

**Føroyar vunnu eitt gullheiðursmerki á juniormeistarastevnuni í Kastrup. Tað syrgdi Birita Debes fyri**

Uni Holm Johannesen

Birita Debes er fyrsta føroyska kvinnan, sum hevur vunnið gull í juniornorðurlandameistarakappingini.

Hon var fyrst á málið seinnapartin leygardagin í 100 metra rygg. Hon svam teinin við tíðini 1.01.04. Tað er nýtt føroyskt met.

Hon skavaði gott og væl tvey sekund av gamla metinum, sum hon eisini átti.

Rókur í Jákupsstovu er næstformaður í Svimjisambandinum. Hann sigur við Kringvarpið, at hann er ovfarin av Biritu Debes.

- Eg standi spyrjandi. Hon svam nógv skjótari enn eg hevði væntað, og hon setir bæði junior- og seniormet. Ein ótrúligur viljastyrki, sigur Rókur í Jákupsstovu.

# Danmark hølvaði hini av

Danmark vann greitt norðurlendsku juniormeistarakappingina í Kastrup, sum var um vikuskiftið. Danir vunnu 19 gullheiðursmerki, og Svøríki vann fýra gull. Stóri vinnarin var Victor Bromer. Hann vann heili fimm gullheiðursmerki.

| | Land | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Danmark | 19 | 9 | 8 |
| 2 | Svøriki | 4 | 18 | 10 |
| 3 | Finnland | 4 | | 8 |
| 4 | Ísland | 2 | 3 | 1 |
| 5 | Noregi | 1 | 2 | 4 |
| 6 | Estland | 1 | | 2 |
| 7 | Føroyar | 1 | | |

**Endaliga úrsliti:**

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Danmark | 365 stig |
| 2. | Svøríki | 327 stig |
| 3. | Noregi | 208 stig |
| 4. | Finnland | 200 stig |
| 5. | Estland | 118 stig |
| 6. | Føroyar | 84 stig |
| 7. | Ísland | 70 stig |



# Fleiri nýggj føroysk met

**Samlaða úrtøkan á NJM 2010 var eitt gullheiðursmerki, tvey føroysk met, átta juniormet, trý landsliðsmet fyri juniorar og eitt landsliðsmet fyri seniornar**

Uni Holm Johannesen

Svimjisambandið er errið av føroysku úrslitunum.

- Saman um tikið eitt avbera flott úrslit í kapping móti svimjarum, sum í stóran mun vóru so mikið sterk, at tað kundi vera trupult hjá føroyingunum at halda seg til sína egnu ætlan. Har vóru onkrir svipsarar, sum tó fyri stóran part skyldast at svimjarar hava verið sjúkir stutt upp undir stevnuna. Men saman um tikið flott at fáa eitt lið heim aftur, har øll hava betrað seg. Har ein vann gull, og har tey har til settu eina rúgvu av metum, skrivar Svimjisambandið í tíðindaskrivi.

**Metini:**

Cecilia Eysturdal, Ægir, setti nýtt juniormet á 800 frí við tíðini 9:20.65.

Birita Debes, FLOT, setti nýtt juniormet á 100 frí við tíðini 58.52.

Magnus Jákupsson, HS, setti nýtt juniormet á 200 firvald við tíðini 2:09.12.

Birita Debes, FLOT, Turið S. Christiansen, Ægir, Poula Ø. Mohr, FS, Cecilia Eysturdal, Ægir, settur nýtt junior-landsliðsmet á 4x100 blandað við tíðini 4:27.57.

Cecilia Eysturdal, Ægir, setti nýtt juniormet á 200 frí við tíðini 2:08.76.

Birita Debes, FLOT, fekk gull, setti føroyskt met og juniormet á 100 rygg við tíðini 1:01.46.

Birita Debes, FLOT, Cecilia Eysturdal, Ægir, Poula Ø. Mohr, FS, og Jonna B. Thomsen, FS, settu nýtt juniorlandsliðsmet á 4x100 frí við tíðini 4:02.35

Birita Debes, FLOT, setti nýtt juniormet á 200 rygg við tíðini 2:20.30

Magnus Jákupsson, FS, setti nýtt føroyskt met og juniormet á 200 rygg við tíðini 2:04.82.

Jonna B. Thomsen, FS, Cecilia Eysturdal, Ægir, Birita Debes, FLOT, og Poula Ø. Mohr, FS, settu nýtt juniormet, seniormet og landsliðsmet á 4x200 frí við tíðini 8:53.23.